# Fer í tingið sum norðoyingur



*Bæði fólkatingsvalið og nú løgtingsvalið hava persónliga verið serstakliga góð val hjá Jákup Mikkelsen í Fólkaflokkinum*
*Mynd: Benjamin Rasmussen*

**Tað fer at síggjast aftur í tingarbeiðinum, at eg eri norðoyingur, lovar Jákup Mikkelsen, nývaldur tingmaður í Fólkaflokkinum**

VALÚRSLIT
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Av teimum í alt 436 persónligu atkvøðunum hjá nývalda Jákupi Mikkelsen, stavaðu heilar 371 av atkvøðunum úr Norðoyggjum. Sjálvur ivast Jákup Mikkelsen heldur ikki í, at tað hevur havt týdning fyri nógvar av hansara veljaraum, at hann er norðoyingur.

### Fleiri stór norðoyamál

Men kunnu hesir veljarar so vænta, at tað fer at síggjast aftur í tingarbeiðinum hjá Jákupi Mikkelsen, at hann er úr Norðoyggjum?

- Ja, tað fer tað. Tað eru fleiri stórmál her norðuri, ið eiga at verða raðfest sum skjótast, sigur Jákup og nevnir millum annað útbyggingina av Klaksvíkar Sjúkrahúsi og tunnilin norður um Fjall.

Viðvíkjandi samgongumøguleikum, dugir Jákup Mikkelsen væl at ímynda sær, at ABC samgongan heldur fram. Um tað ikki ber til, finnast tað nógvir aðrir møguleikar hjá Fólkaflokkinum at koma í samgongu.

### Óttaðist

Jákup Mikkelsen dylur ikki yvir, at hann eina langa løtu óttaðist, at hann fór at gerast ov stuttur til ein tingsess.

- Tá tú ert uppi móti so tungum dreingjum í politikki sum Annfinni Kallsberg, so skulu rættiliga nógvar atkvøður til, áðrenn tað munar, sigur Jákup Mikkelsen.

Hann vísir samstundis á, at um atkvøðurnar hjá Fólkaflokksumboðunum í Norðuroyggjum høvdu verið meir smábýttar, var tað ikki vist, at flokkurin fekk tveir tingmenn valdar.

- Fyri meg persónliga hevur hetta verið eitt ómetaliga gott val, sum eg eri ótrúliga glaður fyri, sigur Jákup og nýtir høvi at takka teimum hjartaliga, ið hava stuðlað Fólkaflokkinum og sær persónliga.

# Álitisváttan til fiskimálaráðharran

**Bjørn Kalsø tók sínar 418 persónligu atkvøður í Klaksvík sum eina álitisváttan til fiskimálaráðharran frá sjálvari fiskivinnuháborgini**

VALÚRSLIT
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Við 418 persónligum atkvøðum gjørdist Bjørn Kalsø heilt stóri atkvøðuslúkurin í Klaksvík.

Sitandi fiskivinnumálaráðharrin fjaldi ikki yvir, at tað serliga fløvaði, at sjálv fiskivinnuháborgin tekur so dyggiliga undir við hansara arbeiði sum fiskivinnumálaráðharri seinastu fýra árini.

### Álitisváttan frá fiskivinnubýnum

Hóast hann enn ikki var vísur í, um hann var tryggjaður ein tingsess, var tað ein sera fegin Bjørn Kalsø, ið kom inn á gólvið í KÍ høllini um 22 tíðina valkvøldið.

Longu tíðliga í uppteljingini í Klaksvík var nevniliga greitt, at bunkin hjá Bjørn Kalsø vaks óvanliga skjótt. Tá avtornaði vísti tað seg eisini, fiskimálaráðharrin var avgjørdi toppskorarin í Klaksvík við 418 persónligum atkvøðum.

Hóast Bjørn Kalsø hevði vónað at gera eitt gott val í Norðoyggjum, hevði hann langt frá torað at droymt um, at tað fór at ganga so væl.

Tað sigst jú, at tað er nærum ógjørligt hjá sitandi fiskimálaráðharranum at gera eitt gott val í fiskivinnubýnum Klaksvík, men tað mótprógva hesi tølini dyggilig. Hetta má heldur sigast at vera ein stór álitisváttan av mínum arbeiði sum fiskivinnumálaráðharri seinastu fýra árini, segði Bjørn Kalsø.

### Heldur fegin fram

Til seinasta løgtingsval gjørdist Bjørn Kalsø akkurát ov stuttur til at koma á ting. Men bert góðar tvær vikur eftir at samgongan var skipað, beyðst honum høvi at gerast fiskivinnumálaráðharri.

Hóast tað mangan hevur brotið í bæði borð kring fiskivinnumálaráðharran, heldur hann hetta hava verið eitt sera spennandi starv. Hann dylur ikki yvir, at hann fegin vildi hildið fram í starvinum, men nú fáa vit at síggja, hvussu leikur fer, sum hann tók til.

- Í fyrsta umfari vóni eg, at Sambandsflokkurin kemur við í samgongu, og at vit fáa gjørt eina so góða samgonguavtalu, sum til ber, segði atkvøðuslúkurin í Klaksvík, áðrenn hann og konan fóru til hús aftur.

Bjørn Kalsø hevði nevniliga valt at halda valkvøldið heima í Klaksvík saman við familjuni, vinum, kenningum og uttan iva mongum politiskum stuðlum.




*Bjørn Kalsø dylur ikki yvir, at hann fegin heldur fram í starvinum sum fiskivinnumálaráðharri, um høvið býðst*
*Mynd: Høgni Thomsen*